## Kanska útlendska arbeiðsmegi

Seinni í ár fer Royal Greenland at søkja eftir arbeiðsfólki til fiskavirkið í Qasigiannguit, sum í løtuni er til umbyggingar. Felagið sigur, at tað fer at leggja seg eftir at fáa lokala arbeiðsmegi til virkið, men eydnast tað ikki, fer felagið ikki at aftra seg við at leita eftir arbeiðsfólki uttanlands. Umleið 80 fólk arbeiða á virkinum, men tørvur verður á umleið 20 afturat. Pâviâraq Heilmann, stjóri, sigur við KNR, at tey rokna við at fáa grønlendska arbeiðsmegi, men at felagið kann noyðast at leita hjá hjálp uttaneftir, eitt nú úr Kina.



## Bíða eftir jarðskjálvta

Sunnudagin verður minningarhald í Japan til minnis um jarðskjálvtan, sum rakti býin Kobe fyri 15 árum síðani. Skjálvtin var 7,2 á Richterstiganum og kravdi umleið 6.400 mannalív. Samstundis ávara japanskir vísindamenn um, at innan 30 ár fer ein harður jarðskjálvti at raka høvuðsstaðin Tokyo. Teirra metingar siga, at tað eru 87 prosent sannlíkindi fyri hesum, og at teir vænta, at skjálvtin verður um 8,0 á Richterstiganum. Í 1923 var ein harður jarðskjálvti á Tokyo-leiðini, og ta ferðina lótu umleið 140.000 fólk lív.

# Heilivágur stolin í Sørvági




*Heilar tríggjar ferðir seinastu vikuna, hava tjóvar stolið heiliváig í Sørvági*
*Savnsmynd*

**Seinastu vikuna hava trý innbrot verið í Sørvági. Tjóvarnir hava brotið inn í tannlæknastovuna, í bilin hjá kommunulæknanum og í kahyttuna hjá skiparanum á Vesturvarða**

STULDUR
*Inna Tørnroos*
*inna@sosialurin.fo*

Sambært løgregluni eru innbrotini framd á miðjari nátt. Umborð á Vesturvarða er medisinkistan stolin, í bilinum hjá kommunulæknanum er læknataskan stolin og hjá tannlæknanum høvdu brotsmennirnir tikið ein pengakassa, sum tó var tómur.

- Ongin ivi er um, at hetta eru misnýtarar, sum eru upp á spæl, sigur Jógvan Páll Joensen, politistur í Vágum.

Tjóvarnir hava fingið fatur á eitt sindur av heilivági, í stóran mun pínudoyvandi evni.

Vágaportalurin skrivar, at ein steinur varð tveittur gjøgnum síðurútin á bilinum hjá kommunulæknanum, har læknataskan stóð.

Politiið í Vágum sigur, at har eru nøkur spor at ganga eftir, men, at ongin er handtikin enn.

- Í Havn er vanligt, at skipini hava vakt gangandi um náttina. Men tað er ikki so vanligt her vesturi, sigur Jógvan Páll Joensen.

Av tí, at innbrotini eru framd um náttina, eru ongi vitni til tilburðirnir.



*Tummas Lervig, formaður í KÍ, staðfestir, at felagið nú hevur funnið eina loysn fyri at rinda endurgjaldið til Tony Paris*

## KÍ loyst Parismálið

**Fótbóltsfelagið í Klaksvík er dømt at rinda meira enn hálva millión krónur eftir rættarmálið við Tony Paris. – Vit hava funnið fram til eina loysn, og tit fáa at vita, hvussu hon er, tá tíðin er búgvin, sigur Tummas Lervig, formaður í KÍ**

FÓTBÓLTUR
*Eirikur í Jákupsstovu*
*eij@sosialurin.fo*

Fyri tíð síðan varð KÍ dømt at ringar meira enn 500.000 krónur í málinum um Tony Paris, sum rætturin avgjørdi var burturvístur av órøttum.

Í gjár var dúgvur fundur í KÍ, har ábyrgdarpersónar í felagnum hittust at tosa um eina loysn.

– Vit hava funnið fram til eina loysn, og tit fáa at vita, hvussu hon er, tá tíðin er búgvin, sigur Tummas Lervig, formaður í KÍ.

Hann leggur afturat, at sjálvandi hava limirnir í KÍ rætt til at vita, hvat gongur fyri seg í felagnum, men at í øllum málum eru tveir partar, og tí mugu limirnir í KÍ brynja seg við toli.

### Høllin

Tað hevur verið nevnt sum ein møguleiki, at KÍ kundi gera okkurt við ítróttarhøllini í Klaksvík, sum KÍ eigur saman við øðrum, men soleiðis verður ikki.

– Høllin er ikki partur av hesi loysnini, staðfestir Tummas Lervig.

Hann sigur somuleiðis, at hetta mál ikki skal raka tað ítróttarliga hjá KÍ, sum hann roknar við fer at flyta upp í bestu deildina heilt skjótt.

# Autistafelagið vil hava nýggja málsviðgerð av heimtøku

**Tíðindaskriv**

Í sendingini Skannarin 11. januar og í tíðindasendingum í Kringvarpinum hava vit hoyrt um avgerðina at flyta ein persón, sum ber brekið Asperger Syndrom, heim úr mennandi tilboði á skúla í Danmark til eitt stovnspláss í Føroyum.

Stórt sjálvbjargni økir munandi um lívsgóðskuna hjá okkum menniskjum, óansæð brek, og er eisini gagnligt fyri samfelagið sum heild.

Sambært útsøgnum frá foreldrum og fakfólki á danska stovninum tykist rættiliga ivasamt, um persónurin higatil hevur fingið møguleikan at menna seg í tann mun, hetta letur seg gera. Vit vita, at fakliga umhvørvið á hesum øki ikki er serliga stórt í Føroyum og tískil er rættiliga ivasamt, um tað tilboð, sum viðkomandi fær bjóðað á stovnsplássinum í Føroyum, fer at byggja víðari uppá jaligu menningina, sum er byrjað á danska skúlanum.

Tað tykist greitt, at fleiri misskiljingar eru farnar fram í útsøgnum frá bæði foreldrum og avvarandi fakfólki í Danmark, ið kunnu hava ávirkað málsviðgerðina.

Felagið heitir tí á avvarandi myndugleikar um at vísa stórsinni og taka málið upp av nýggjum í samstarvi við foreldur og tey fakfólk, ið frammanundan hava neyðuga kunnleikan um bæði viðkomandi persón og hansara brek.

*Vegna LFA – Landsfelagið fyri fólk við autismu*
*Jørmund Foldbo, formaður*